# Tofta skúli – útbygging

Fyri NES KOMMUNU verður arbeiðið í sambandi við útbygging av Tofta Skúla, sum fevnir um nýbygging uppá 2561 $m^2$ og umbygging uppá 1725 $m^2$, boðið út alment sum niðanfyri tilskilað.

1. **Høvuðsentreprisa** sum fevnir um
   hesar arbeiðstøkur
   Jørðarbeiði (regulering)
   Kloakkarbeiði
   Betongarbeiði
   Stálarbeiði
   Timburarbeiði (uttan og innan)
   Snikkaraarbeiði (uttan og innan)
   Lendisarbeiði

**Fakentreprisur:**
**2. Múraraabreiði**
**3. Hvs, ventilatión, sprinklari**
**4. El-arbeiði**
**5. Málaraarbeiði**
**6. Gólváleggingararbeiði**

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F. í seinasta lagi mánadagin 19. september 2005.
Tilfarið verður latið teim bjóðandi frá mánadegi 19. september 2005.
Veðhald fyri tilfari fyri **høvuðsentreprisu** er kr. 10.000,-
Veðhald fyri tilfar fyri **fakentreprisu** ein ella fleiri íalt kr. 5.000,-
Veðhald verður latið við krossaðum kekki merktur: **Tofta Skúli.**

**Ástaðarfundur verður mikudagin kl. 15.00 tann 28. september 2005.**

Tilboð skulu, saman við útbjóðingartilfarinum, latast inn á teknistovuna hjá Alobert Isfeld & Gudmund S.Hansen, arkitektar A. F., Lucas Debesargøta 11, Tórshavn í afturlatnum brævbjálva merktur:

**Tofta Skúli – útbygging**
Tilboð

í seinasta lagi mánadagin **17. oktober 2005 kl. 16.00.**
Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi verða hjástaddir.

**Alberg Isfeld & Gudmund S. Hansen**, arkitektar
Lucas Debesargøta 100 · 100 Tórshavn

**Landsbyggifelagið**, ráðgevandi verkfrøðingar
Grønlandsvegur 5 · 100 Tórshavn

**Sofus M. Jakobsen**, ráðgevandi verkfrøðingur
J. H. Schrøtersgøta 22 · 100 Tórshavn

**Viggo A. Hansen**, ráðgevandi verkfrøðingar
Jekaragøta 10 · 100 Tórshavn

**Salongin**
er stongd frá hósdegnum
15. sept. til týsdagin 20. sept.
Frisør
Tlf. 315211

# Leiðari til Virkishúsið fyri Ung í Klaksvík

Klaksvíkar kommuna er í ferð við at seta á stovn eitt virkishús fyri ung í Klaksvík og søkir í hesum sambandi eftir leiðara.

Talan er um eitt fulltíðarstarv.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- at hava ábyrgd av dagliga virkseminum
- at hava ábyrgd av fyristingini og fíggjarligu viðurskiftunum í virkishúsinum

**Aðrar uppgávur eru:**
- at skapa møguleika hjá børnum og ungum fyri mennandi upplivingum í rúsfríum umhvørvi
- at skipa fyri tiltøkum til frama fyri børn og ung í Klaksvíkar kommunu
- fylgja við og kunna seg um menning, sum fer fram á økinum
- samstarva við feløg og einstaklingar um felags mál
- at verða við í norðurlendskum samstarvi

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**
- hevur hugsjónir um virksemið í einum barna- og ungdómshúsi
- breiða vitan um ungdómsarbeiði sum heild
- kann ganga á odda og arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at fyrisita og leiða
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur
- dugir at samskifta innan- og uttanhýsis
- hevur nátúrligan myndugleika og ein nútímans leiðslustíl

**Útbúgving/royndir:**
- pedagogur, lærari ella aðra viðkomandi útbúgving
- helst hava royndir innan leiðslu
- kunnleika til EDV

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum
- at verða við frá byrjan og byggja stovnin upp
- góðar samstarvsfelagar

**Setanarviðurskifti:**
- lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag
- verður at tola bygnaðarbroytingar
- starvið verður sett skjótast til ber

**Fleiri upplýsingar**
fáast við at venda sær til Jancy Biskopstø Klein sosialdeildarleiðara ella John Færø býráðsskrivara á telefon 41 00 00.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera
**Klaksvíkar kommunu, postboks 2, 700 Klaksvík** í hendi í seinasta lagi 23. september 2005.

**Klaksvíkar Kommuna**

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

# Tímalønt arbeiðsfólk til Mikladal og Trøllanes

Klaksvíkar kommuna fer at seta ein tímaløntan persón til at taka sær av kommunalum arbeiðum í norðaru helvt av Kalsoynni, har arbeiðsøkið verður Mikladalur og Trøllanes, sum eru partur av Klaksvíkar Kommunu.

Arbeiðið er sera fjølbroytt og fevnir um fyrifallandi arbeiði t.d.:
- umvæling av skúla,
- vegaumvæling og vegarøkt,
- vatnveiting, kaðalgrevstur og gøtuljós
- røkt av kirkjugørðum,
- ruskmóttøkupláss
- fríðkanararbeiði og
- umvæling av viðarlund og øðrum arbeiðum.
- Ætlanin er eisini, at viðkomandi, saman við øðrum bønarmanni, skal taka sær av grevstri v.m. í sambandi við jarðarferðir.

Tann, ið settur verður, hevur tilvísing til arbeiðsformannin á vegadeildini hjá kommununi, men samstarv verður eisini við allar deildir undir Teknisku Umsiting. Roknast skal við, at arbeiðsøkið til tíðir fer at fevna um alla kommununa. Eisini skal roknast við møguligum bygnaðarbroytingum.

Arbeiðsbilur og onnur neyðug amboð eru tøk til arbeiðið, og væntandi verður ávíst samstarv við Landsverk.

Vit sóknast eftir einum persóni, sum hevur neyðugan førleika til at røkja arbeiðið, sum nevnt omanfyri. Yrkisútbúgving er ikki eitt krav, men arbeiðsfólkið skal helst hava royndir á økinum og vera hegnigur til handaligt arbeiði og vera fyrikomandi. Koyrikort krevst.

Tímalønta starvið skal setast skjótast tilber, og lønin verður sambært avvarandi yrkisfelag. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Andras Joensen vegformann á tlf. 21 73 88 ella Hans Fróða Hansen á Teknisku Umsiting á tlf. 41 00 00.

Umsóknir saman við viðkomandi upplýsingum, s.s. royndir, møgulig viðmæli v.m. verða at senda til:

Klaksvíkar Kommuna
Postsmoga 2
700 Klaksvík

Og skulu verða okkum í hendi **í seinasta lagi 23. september 2005.**

**Klaksvíkar Býráð**
**tlf. 41 00 00**
**telefax 41 00 01**

Sosialurin
www.sosialurin.fo